




**Skírishósdag, Langafríggjadag, leygardagin 15. apríl, 1. Páskadag og 2. Páskadag kl. 12.00 - 22.00 bjóðar Glasstovan hesa Páskamatskrá:**

**Forrættur:** Skeljadjóraragout við lættstoktum djúphavsjákupskeljum

**Høvuðsrættur:** Heilstoktur lambsryggur við rósumarinrómaglace

**Omaná:** Sjokuláta dessert við jarðberum

**Prísur:** 3 rættir kr. 195,-

**Barnabuffet** íroknað sodavatn og ís kr. 59,-

**Sertilboð fyri gisting við morgunmati:**
Dupult kamar kr. 350,-
Einkult kamar kr. 500,-
*Prísurin er galdandi pr. persón/pr. nátt í tíðarskeiðnum 13. - 17. april*

Bíleggið á 317500 ella á www.hotelforoyar.fo.

★★★★
GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*



# Kundaráðgevi

til Suðuroyar Sparikassa á Tvøroyri

**Vilt tú vera við til at seta kundan í fokus? Vilt tú gerast ein týðandi leikari á einum nýskapandi liði?**

Suðuroyar Sparikassi søkir eftir kundaráðgeva til deildina á Tvøroyri.

HØVUÐSUPPGÁVUR
Ráðgeving av privatkundum, og kredittviðgerð. Harumframt fært tú ein týðandi leiklut í framhaldandi menningini av Suðuroyar Sparikassa.

FØRLEIKAKRØV
Peningastovnsútbúgving við hóskandi eftirútbúgving, samsvarandi útbúgving ella hægri útbúgving.

Vit vænta at tú er positiv/ur, ágrýtin og fyrikomandi og dámar fjølbroyttar uppgávur. Hevur tú hug at frætta nærri um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við

**Marner Magnussen**
**Deildarleiðari**
**Suðuroyar Sparikassi**
**marner@sparsu.fo**

**Umsóknarfreistin er 18. apríl 2006.**
Umsóknir skulu sendast til Suðuroyar Sparikassa, Postboks 109, 800 Tvøroyri, móttakari: Marner Magnussen, deildarleiðari.

Vitja eisini heimasíðu okkara www.sparsu.fo

Liðið hjá Suðuroyar Sparikassa er mannað við 19 fólkum. Vit arbeiða saman fyri at veita kundum okkara eina munadygga tænastu og at tryggja framtíðina hjá Suðuroyar Sparikassa. Vit seta kundan í fokus og leggja áherðslu á nýskapan, førleikamenning og hugna fyri okkara kundar.

SUÐUROYAR SPARIKASSI Postboks 109 · 800 Tvøroyri · Telefon 359870 · Fax 359874
www.sparsu.fo · sparsu@sparsu.fo

REPROZ

# Ein millión

## til at marknaðarføra Føroyar

Bjóðið verðini vælkomnari til Føroya at ferðast. Søkið nú um stuðul og verið við til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál!

Ferðaráð Føroya bjóðar til samstarv um at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál. Til endamálið eru 1.000.000 kr. settar av til serlig marknaðarátøk.

Milliónin skal nýtast soleiðis, at føroysk virki/feløg, ið fáast við ferðavinnu, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir eftir »krónu til krónu« háttinum. Hetta vil siga, at umsøkjarin letur eins stóra upphædd til verkætlanina, sum stuðul verður latin frá Ferðaráð Føroya.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur, og mesti stuðul er 250.000 krónur. Ganga fleiri saman um eina verkætlan, kann í serligum føri verða vikið frá hámarkinum, treytað av at verkætlanin er av slíkari støddd, at stuðul kann verða latin.

Nýskapandi tiltøk hava fyrimun. Verkætlanir, har tvey ella fleiri virkir/feløg ganga saman hava eisini fyrimun. Verkætlanin skal ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini. Stuðul verður ikki latin til faldarar, uttan so at teir eru beinleiðis knýttir at verkætlanini, ið søkt verður um stuðul til.

Tað ber til at samstarva við sambond uttanlands, men bara tann føroyski parturin í verkætlanini fær stuðul.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er framd í verki.

### Upplýsingar

Í umsóknini skal í øllum førum verða greitt frá

- endamáli
- kostnaðarætlan
- fíggjarætlan
- tíðarætlan
- samstarvspørtum

### Umsóknarblað

Umsóknir skulu sendast Ferðaráði Føroya á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður frá www.tourist.fo og sum annars er at fáa frá Ferðaráði Føroya.

### Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin er 15. mai 2006.

REPROZ

Faroe Islands

Ferðaráð Føroya · undir Bryggjubakka 17 · Postsmoga 118 · FO-110 Tórshavn
Tlf +298 355 800 · Fax +298 355 801 · www.tourist.fo